# FJM Runavík søkir forritara

Søkt verður eftir fólki til okkara menningartoymi. Vit arbeiða við Machine Vision, automatión og vatnskering í sambandi við nýggju kílaskerimaskinuna, sum vit hava ment.

Høvuðsuppgávur hjá tær sum forritara er at verða við í menningartoyminum hjá fyritøkuni, herundir at menna forrit og stýriskipanir til hesa og aðrar maskinur.

Tú hevur royndir innan automatión og hardware programmering og ert opin og fyrikomandi. Aðrir førleikar eru:

- drúgvar royndir við OO programmering
- royndir við Delphi
- kunnleika til netverk
- kunnleika til hardware
- ert tolin og dugir væl at samskifta
- ert sinnaður at ferðast

Vit bjóða tær eitt avbjóðandi starv í einum spennandi og virknum umhvørvi við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning. Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu partanna millum. Arbeiðsstaðið verður í Runavík, har eini 40 fólk starvast við at veita bæði rustfríar og mekaniskar tænastur.

Skrivlig umsókn við møguligum avritum av prógvum o.ø. skal sendast til:

FJM Runavík
Postsmoga 192
FO-620 Runavík
Att.: Frithleif Olsen

í seinasta lagi 16. desember 2005. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Frithleif Olsen á tel. 50 11 90 ella við telduposti til frithleif.olsen@faroeyard.fo.

*Á p/f Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 260 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fata um stál, rustfrítt stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis søla. Skipasmiðjan hevur deildir í Havn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

FJM RUNAVÍK

**FJM Runavík**
Tel +298 30 11 90
Fax +298 30 11 91
fjm@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

# Heimarøktin Sandoyar Øki

**søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingi til barnsburðarfarloyvi og eftir heilsurøktarum í føst størv**

Søkt verður eftir einum barnsburðaravloysara fyri sjúkrarøktarfrøðingi á setanarbrøki 0,7 í tíðarskeiðnum 1. januar 2006 til 30. september 2006 og trimum heilsurøktarum í føst størv á setanarbrøki 0,7.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Heimarøktin Sandoyar Øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlisrøkt er samskipað, og har starvast verður á øllum eindum.

**Vit søkja eftir fólki:**
- við røktarfakligum royndum
- sum hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- sum hevur hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagar, lesandi og næmingar
- sum hevur hug at starvast bæði inni á bústovnum og úti í heimarøktini.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við skiftandi avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini eru lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 361749 ella 213890.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av autorisatión, prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin Sandoyar Øki**
Áargarður
210 Sandur

**Umsóknarfreist:** 21. desember 2005.


## STANLEY Gávubúðin

**LANGUR LEYGARDAGUR**
**10. desember**
**Opið til kl. 17.00**

**Leikur - 10%**
**Gávur - 10%**
**Búnýti - 10%**

**Útsøla jólaprýði**
**-50%**
**av útsøluprísinum**

**Jólamaðurin vitjar kl. 13.00**

**STANLEY**
Tel 42 22 70 · 460 Norðskála



Vit søkja:



Lærling til møbladeildina

fá nærri at vita á
www.farodane.fo

FARODANE
casa



## Innbúgv til klædnahandil til sølu

Hillar v.m.

Eisini hópin av útsillingsdukkum

**Ring og hoyr nærri á telefon 421123**

I. R - Lastvognar
P/F I. R. LASTVOGNAR · FO-410 KOLLAFJØRUR
TELEFON 42 11 23 · FAX 42 13 66 · IAN@IAN.FO · WWW.IAN.FO



**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820



KEYP SPORTSFELGUR...



LÆTT OG TRYGT

Sosialurin 341800



...við dekkum á alnótini
WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA · TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22